VÁGA KOMMUNA

Tel. +298 34 44 00
Fax. +298 33 34 70
vaga@vaga.fo
www.vaga.fo

Hammershaimbsvegur 1
360 Sandavágur

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 3. Almennur fundur |
| Fundardagur | 30. januar 2017 kl. 18:00 |
| Fundarstaður | Miðvágs Skúli |

Møtt: Eyðdis Hartmann Niclasen, Jens Gaardlykke, Dagbjørn Hansen, Heðin Poulsen, Jórun Haraldsen, Rósa Samuelsen, Dánial Johansen, Jonhard Joensen, Jóhannis Joensen, Dánjal Thomsen og Albert Ellefsen.
Skrivari: Georg Hansen

## Yvirlit yvir mál til viðgerðar

| Pkt. | Tekstur | Síða |
|---|---|---|
| 19 | Útstykking við Olivarsveg | 1 |
| 20 | Miðstaðarøki í Miðvági | 2 |
| 21 | Umsókn um marknaumskipan millum matr. 1a og 2c í Miðvági | 4 |
| 22 | Sundurbýti av matr. 4d í Sandavági | 5 |

**2016-41-40**

## 19. Útstykking við Olivarsveg

### Málsfrágreiðing

Býráðið samtykti á fundi tann 31. august 2016 at næsta útstykkingin í Miðvági skuldi gerast á økinum, sum kommunan eigur við Olivarsveg.
Tekniski leiðarin hevur heitt á HMPconsult um at gera uppskot til, hvussu útstykkingin skal síggja út.
Uppskot frá HMPconsult fyriliggur.

**Tilmæli, 29. september 2016, pkt. 92:**
Umsitingin mælir býráðnum til at samtykkja at HMPconsult arbeiðir víðari við málinum.
Grundstykkini skulu í minsta lagi vera 25 metrar breið.

**Býráðið, 29. september 2016, pkt. 92:**
Viðmælt.

Tel. +298 34 44 00
Fax. +298 33 34 70
vaga@vaga.fo
www.vaga.fo

Hammershaimbsvegur 1
360 Sandavágur

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 3. Almennur fundur |
| Fundardagur | 30. januar 2017 kl. 18:00 |
| Fundarstaður | Miðvágs Skúli |

**Býráðið, 29. september 2016, pkt. 91:**
Samtykt.
-----
Tilfar fyrliggur til at bjóða jørðarbeiðið út fyri verkætlanina.

**Tilmæli 9. december 2016, pkt. 182:**
Tekniski leiðarin mælir Teknisku nevnd til at taka undir við fyriliggjandi tilfari og at bjóða jørðarbeiðið út.

**Tekniska nevnd, 9. december 2016, pkt. 182:**
Samtykt.
-------
Kunnað verður um málið.

**Tilmæli 20. januar 2017, pkt. 10:**
Tekniski leiðarin mælir Teknisku nevnd til at taka støðu til, um verkætlanin skal gerast.

**Tekniska nevnd, 20. januar 2017, pkt. 10:**
Nevndin mælir til at halda fast við verandi verkætlan.

### Avgerð

Samtykt.
Jens Gaardlykke viðmerkir, at hann prinsippielt er ímóti hesi útstykkingini.

**2014-47-41**

## 20. Miðstaðarøki í Miðvági

### Málsfrágreiðing

Fleiri uppskot fyriliggja um eitt miðstaðarøki í Miðvági. Býráðið hevur savnað hesi uppskot og biðið Torben hjá Hjálpirót taka samanum og koma við einum heildaruppskotið.

**Mentunar- og trivnaðarnevnd, 9. apríl 2015, pkt. 40:**

VÁGA KOMMUNA

Tel. +298 34 44 00
Fax. +298 33 34 70
vaga@vaga.fo
www.vaga.fo

Hammershaimbsvegur 1
360 Sandavágur

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 3. Almennur fundur |
| Fundardagur | 30. januar 2017 kl. 18:00 |
| Fundarstaður | Miðvágs Skúli |

Mælt verður til at arbeiða víðari við heildarætlanini, men seta fokus á at gera Lítlafløtt fyrst.

**Tekniska nevnd, 10. apríl 2015, pkt 57:**
Mælt verður til at arbeiða víðari við heildarætlanini, men seta fokus á at gera Lítlafløtt fyrst.

**Fíggjarnevndin, 13. apríl 2015, pkt. 45:**
Nevndin bleiv kunnað um ætlanina.
----------
Skitsuuppskot til miðstaðarøkið í Miðvági var lagt fram á Vágafagnaðinum 5. mars 2016.
Eftirfylgjandi eru smáar tillagingar gjørdar, millum annað grundað á viðmerkingar frá borgarum á Vágafagnaðinum.
Kunnað verður um verkætlanina og um hvat eftir ætlan verður gjørt í ár innanfyri fíggjarkarmarnar í 2016.

**Tilmæli 19. august 2016, pkt. 114:**
Umsitingin mælir Teknisku nevnd til at taka kunningina til eftirtektar.

**Tekniska nevnd, 19. august 2016, pkt. 114:**
Tikið til eftirtektar.

---------------------------------------------------------------------------
Jens Gaardlykke og Jórun Haraldsen hava lagt fram nýtt uppskot, har mælt verður til at byrja arbeiðið inni í viðarlundini.

**Tilmæli 19. januar 2017, pkt. 11:**
Mælt verður nevndini til at taka støðu til ætlanina og gera sítt tilmæli til teknisku nevnd.

**Mentunar- og trivnaðarnevnd, 19. januar 2017, pkt. 11:**
Samtykt at bjóða Torben hjá Hjálpirót vestur sum skjótast at tekna broytingarnar inn í heildarætlanina um miðstaðarøki.
Neyðugt er at fáa loyvi frá friðingarmynduleikunum til arbeiðið í ósanum.
Neyðugt er at fáa loyvi frá Skógrøkt Landsins um arbeiði í viðarlundini.

**Tilmæli 20. januar 2017, pkt. 8:**
Tekniski leiðarin mælir Teknisku nevnd til at taka støðu til málið.

**Tekniska nevnd, 20. januar 2017, pkt. 8:**
Ein meiriluti (Dagbjørn Hansen, Jonhard Joensen, Heðin Poulsen og Dánjal Thomsen) taka undir við Mentunar- og trivnaðarnevndini.

VÁGA KOMMUNA

Tel. +298 34 44 00
Fax. +298 33 34 70
vaga@vaga.fo
www.vaga.fo

Hammershaimbsvegur 1
360 Sandavágur

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 3. Almennur fundur |
| Fundardagur | 30. januar 2017 kl. 18:00 |
| Fundarstaður | Miðvágs Skúli |

Ein minniluti (Dánial Johansen) tekur ikki við undir við at lítlifløttur verður tikin úr ætlanini.

-----------
Hjálpirót hevur gjørt uppskot um, hvussu arbeiðið milum Miðvágs Skúla og viðarlundina kann gerast.

## Avgerð

Samtykt at arbeiða víðari við hesi ætlanini.
Samtykt beinanvegin at søkja friðingarmynduleikarnar og Skógrøkt Landsins um neyðug loyvir.
Dánial Johansen tekur ikki við undir við. at Lítlifløttur ikki verður gjørdur til Vestanstevnuna.

**2016-41-41**

## 21. Umsókn um marknaumskipan millum matr. 1a og 2c í Miðvági

## Málsfrágreiðing

Oddur Samuelsen søkir um marknaðumskipan millum matr. nr. 1a og 2c í Miðvági, soleiðis at 4 av 8 gyllin av uttangarðsjørð, heimahoyrandi á Tjørndalsegg í Miðvági verða latin frá matr. nr. 1a í Miðvági til matr. nr. 2c í Miðvági.
Oddur Samuelsen er eigari av báðum matriklum.

**Tilmæli 16. september 2016, pkt. 139:**
Umsitingin mælir Teknisku nevnd til at viðmæla umsóknini.

**Tekniska nevnd, 16. september 2016, pkt. 139:**
Viðmælt.

**Býráðið, 29. september 2016, pkt. 88:**
Viðmælt.
---
Umsøkjarin hevur sent inn nýggja umsókn um marknaumskipan av matr. nr. 1a og 2c í Miðvági.
Søkt verður um, at marknaðumskipan verður gjørd millum matriklarnar báðar soleiðis, at teir verða eins stórir - góðar 2400m2 hvør, meðan hvørt stykki sær verða knýtt at 4 av teimum 8 gyllin av uttangarðsjørð, sum í upprunaligu umsóknini.

VÁGA KOMMUNA

Tel. +298 34 44 00
Fax. +298 33 34 70
vaga@vaga.fo
www.vaga.fo

Hammershaimbsvegur 1
360 Sandavágur

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 3. Almennur fundur |
| Fundardagur | 30. januar 2017 kl. 18:00 |
| Fundarstaður | Miðvágs Skúli |

**Tilmæli 20. januar 2017, pkt. 13:**
Tekniski leiðarin mælir Teknisku nevnd til at viðmæla umsóknini.

**Tekniska nevnd, 20. januar 2017, pkt. 13:**
Viðmælt.

### Avgerð

Viðmælt.

**2016-41-57**

## 22. Sundurbýti av matr. 4d í Sandavági

### Málsfrágreiðing

Matr. nr. 4d í Sandavági er sent Umhvørvisstovuni til sundurbýti (ísv útstykking við Stóraklett).
Umsitingin er nú vorðin varug við, at ikki er lagt upp fyri, at Traðarvegurin í framtíðini kann breiðkast. Har Traðarvegurin gongur fram við matr. nr. 4d, er hann í dag góðar 4 m breiður.
Á ovasta (sunnasta) parti av Traðarvegnum eigur kommunan nakað av lendi fram við vegnum, sum kann nýtast til at breiðka vegin við í eini framtíðar verkætlan - evt. tá byggilendi úti á Trøð verður realiserað. Her er vegamatrikulin á leið 10m. Meðan vegamatrikulin á restini av teininum er ikki meiri enn 7m.
Mett verður at vit eiga at leggja upp fyri breiðkan av vegnum soleiðis, at niðastu stykkini á Stórakletti verða minkaði samsvarandi.
Borgarin, sum hevur skrivað seg upp til annað av hesum stykkjunum, er kunnaður um støðuna.
Uppskot til broytta matrikulering fyriliggur.

**Tilmæli 20. januar 2017, pkt. 14:**
Tekniski leiðarin mælir Teknisku nevnd til at viðmæla uppskotinum til matrikulering av matr. nr. 4d í Sandavági.

**Tekniska nevnd, 20. januar 2017, pkt. 14:**
Viðmælt.

### Avgerð

VÁGA KOMMUNA

Tel. +298 34 44 00
Fax. +298 33 34 70
vaga@vaga.fo
www.vaga.fo

Hammershaimbsvegur 1
360 Sandavágur

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 3. Almennur fundur |
| Fundardagur | 30. januar 2017 kl. 18:00 |
| Fundarstaður | Miðvágs Skúli |

Viðmælt.

**Bók lisin Fundur lokin**

Eyðdis Hartmann Niclasen

Dagbjørn Hansen

Jens Gaardlykke

Heðin Poulsen

Jórun Haraldsen

Rósa Samuelsen

Dánial Johansen

Jonhard Joensen

Jóhannis Joensen

Dánjal Thomsen

Albert Ellefsen